# Lætt at vera formaður, tá tað gongur væl

**- Eg kenni tað sum eina álitisváttan at vera afturvaldur, sigur Jákup Sólstein, sum nú fer undir sítt 11. ár sum formaður í Føroya Reiðarafelag**


ALLAR

ENTREPRENØR MASKINUR…



Alt innan nýtt og brúkt

KOMATSU í Føroyum

sp/f KBI

Postbox 354 · FO-700 Klaksvík · Faroe Islands

Mobile: +298 214406 · Phone: +298 458606 · FAX +298 458706


FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*

Fríggjadagin, 24. mai, hevði Føroya Reiðarafelag ársaðalfund. Á fundinum varð Jákup Sólstein afturvaldur sum formaður í felagnum, samstundis sum nevndin annars heldur fram óbroytt.

Sosialurin fer at hyggja í ársfrágreiðing felagsins til blaðið týsdagin.

## Gongur væl

Jákup Sólstein hevur verið formaður í Føroya Reiðarafelag seinastu 10 árini og fer nú undir sítt 11. ár sum formaður.

– Jú, eg kenni tað sum eina álitisváttan at vera afturvaldur, sigur formaðurin.

Skipanin hjá Føroya Reiðarafelag sigur, at nevndin skipar seg á hvørjum ári, og tað merkir í prinsippinum, at formaðurin kann skiftast út ella verða sitandi, tá ið aðalfundur er.

Áðrenn Jákup gjørdist formaður fyri 10 árum síðan, hevði hann sitið fleiri ár í nevnd felagsins, og meginpartin av tí tíðini var Osmund Justinussen formaður. Osmund hevur ikki verið í nevndini í reiðarafelagnum í fleiri ár.

– Tað er lætt at vera formaður og at vera afturvaldur, tá ið tað gongur væl, sigur Jákup Sólstein.

Hann vísir á, at seinastu árini hava verið góð hjá meginpartinum av flotanum, burtursæð frá rækjuflotanum, sum gongur ógvuliga illa.

– Høvuðsorsøkin er lágu rækjuprísirnir og stóru oljuútreiðslurnar, sum skipini hava, sigur formaðurin í reiðarafelagnum, Jákup Sólstein.



*Jákup Sólstein hevur verið formaður í Føroya Reiðarafelag í 10 ár. Á ársaðalfundi, 24. mai, varð hann afturvaldur til formann*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið vístu samkenslu, tá kæri sonur, maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Hans Erik Olsen,**
Klaksvík

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar og gávur. Tøkk til øll, ið hjálptu okkum á ymsan hátt og fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Mona, Beth, Lena, Urbanus og Monica**

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verpápi, abbi, langabbi og svágur okkara

**Petur Bjarnastein**
f. 22.12.1913

andaðist á Landssjúkrahúsinum 29. mai 2002, 88 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar kirkju leygardagin 1. juni, kl. 14.00.

*fyri tey avvarðandi*

**Magda, Bjarni, Finn og Regin**

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at góði maður mín, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Hinderiekus Lamain**
ættaður úr Delfzijl, Holland

andaðist mikudagin 29. mai, 72 ára gamal.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

*Familjunnar vegna*

**Marjun, Randi, Turið, Zacharias og Jona**


I Rederiet A.P. Møller får du en maritim lederuddannelse med en verden af muligheder.

Maritim Lederuddannelse

**Officersaspirant hos A.P. Møller**

DU søger udfordringer og karrieremuligheder i et internationalt miljø
- har hænderne og hovedet skruet rigtigt på
- har en studentereksamen, HTX, HF eller HHX med matematik eller tilsvarende gymnasialt niveau.
- er i almindelig god fysisk form og ikke farveblind

VI tilbyder dig en udfordrende og afvekslende uddannelse og karriere som skibsofficer og kommende Maritim Leder i Rederiet A.P. Møller.

Uddannelsen kan påbegyndes d. 29. juli 2002 samt primo januar 2003, og foregår som en kombination af teoretisk uddannelse ved Svendborg International Maritime Academy (SIMAC) og sejlpraktik i Rederiets skibe.



Rekvirer materiale og ansøgningsskema ved:

**A.P. Møller Marine Department**
Telefon +45 63 21 21 00
E-mail: cadet@maersk.com

Eller besøg vores hjemmeside med information og ansøgningsformular: www.maritim-leder.dk

Rederiet A.P. Møller beskæftiger over 60.000 medarbejdere og har kontorer i mere end 100 lande.

A.P. Møller flåden tæller over 250 skibe på omkring 12 millioner tons dødvægt, og omfatter container-, tank-, bulk- og forsyningsskibe, samt specialskibe og borerigge.

MÆRSK




# 24 ára gamal stungin niður

HARÐSKAPUR

*Stefan í Skorini*

Nakrir menn komu til ilnar uttanfyri Keypssamtøkuna í Dr. Jakobsensgøtu í Havn fríggjanáttina. Endin var, at ein 24 ára gamal maður varð stungin niður av einum 42 ára gomlum manni.

Maðurin hevði ein lítlan felliknív, og hann rakti tann 24 ára gamla í lunga. Hann hevur fingið viðgerð á landssjúkrahúsinum og er uttanfyri lívsvanda. Hann er tó framvegis undir eygleiðing.

Tilsamans vóru fýra mans á staðnum, tá álopið fór fram. Tann 42 ára gamli varð handtikin stutt eftir tilburðin.

Illstøðan snúði seg um pening. Onkur av monnunum hevði lagt ein vinmann hjá tí 24 ára gamla undir at skylda eina lítla upphædd av peningi, og soleiðis komu menninir til ilnar.

42 ára gamli maðurin var til grundlógaravhoyring í Føroya Rætti fríggjadagin, eftir at blaðið var farið til prentingar, og ákæra verður væntandi reist móti honum.




LONDON

SUMMER GROUP PRICES

30. juni - 8. juli
4. august - 12. august

**HOTEL REGENCY - 8 nætur**

| | |
|---|---|
| Vaksin | **kr. 7.595,-** |
| Børn | **kr. 4.595,-** |

Prísurin byggir á, at 2 -12 ára gomul børn búgva á kamari saman við tveimum vaksnum.

**Við í prísinum:**
- 8 nætur á dubultkamari við enskum buffet-morgunmati
- Bussur frá Stansted til hotellið í London (og aftur)
- Rundferð í London (við bussi og ferðaleiðara) uml. 2 1/2 tíma
- Tower of London (við bussi og ferðaleiðara) hálvan dag
- Mademe Tussauds Wax Museum (við bussi og ferðaleiðara) hálvan dag
- Imperial War Museum (við bussi og ferðaleiðara) hálvan dag
- Lion King sangleikur eftir Elton John og Tim Rice (við bussi)
- Mama Mia sangleikur um ABBA (við bussi aftur og fram og døgurða aftaná framførsluna)
- Ferðaavgjald

ATLANTIC AIRWAYS

Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic fo

www.atlantic.fo



**Vaskifólk**
**til Norðoya Sparikassa**

Norðoya Sparikassi søkir eftir vaskifólki til høvuðsdeildina í Klaksvík at byrja skjótast tilber.

Talan er um starv sum avloysari, men møguleiki er fyri føstum starvi seinni.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi í seinasta lagi **hósdagin 6. juni 2002 kl. 18.00.**

Hevur tú hug at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Eyðun Nolsøe á beinleiðis telefon nr. 475072 ella teldupostbústaði eydunn@ns.fo.

*Norðoya Sparikassi er ein sjálvstøðugur lokalur peningastovnur, hvørs høvuðsøki eru Norðoyggjar og Leirvík. Høvuðsskrivstovan og ein deild eru í Klaksvík. Harumframt eru deildir í Norðdepli, á Viðareiði og í Leirvík. Norðoya Sparikassi hevur altíð verið peningastovnur lántakaranna, og vil vera tað framyvir. Harumframt er sparikassin seinnu árini farin at virka sum peningastovnur fyri vinnulívið. Norðoya Sparikassi leggur stóran dent á at viðvirka til menning og framburð í sínum virkisøki, og at vera hollur ráðgevi við skjótari og góðari tænastu og trygdini í hásæti.*

*Í løtuni starvast 33 fólk í Norðoya Sparikassa.*

Norðoya Sparikassi Ósávegur 1 Postboks 149 FO-700 Klaksvík
Tel: 475000 Fax: 476000 Teldupostur: ns@ns.fo www.ns.fo





**Tosa í frítíðini …**
Til tín, ið tosar mest í frítíðini

GSM FRÍTÍÐ er ÓKEYPIS at stovna

**Send SMS-boð fyri bara**
**0,50 kr/stk**

GSM frítíð kann bert nýtast í Føroyum. Ókeypis stovnan er galdandi frá 1. maj til 31. juli. Fyrivarni verður tikið móti prentvillum.

GSM FRÍTÍÐ

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum